# Gospel til frama fyri flótta



*Etta er sera livandi, tá ið hon syngur*

**Sunnukvøldið framførdi Etta Cameron í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Føroyska kórið VOX hitaði upp fyri hann. Tað vóru tvær sera góðar framførslur frá bæði Etuu og VOX**

GOSPELKONSERT
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

Sunnukvøldið var konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði við VOX og Ettu Cameron. VOX framførdi fyrst sínar egnu sangir og síðani kom Etta við.

Sangararnir í VOX vóru stuðulssangarar hjá Ettu, og tað kláraðu teir bara væl, hóast tey ikki høvdu nógva tíð at venja saman við henni.

Konsertin byrjaði við framførsluni hjá VOX. Frálíka kórið við útvaldum sangarum var eitt sindur skert hetta kvøldið.

## VOX legði út

Tað er kanska ikki altíð lætt at byrja eina slíka konsert, har ið tey flestu vóru komin fyri at hoyra Ettu Cameron, men VOX kláraði seg tó væl.

Kórleiðarin Ásbjørn er altíð lívligur, og hann royndi eisini at fáa áhoyrararnar við uppá tað, hóast tað gekk eitt sindur trekt.

VOX sungu tveir frálíkar sangir hjá Kirk Franklin. Til tann seinna kom tann obligatoriska ”syngi viðsession”, sum altíð er til gospelkonsertir. Áhoyrararnir tóktust tó ikki at vera so væl upplagdir at syngja. Tað var tó ikki tí, at teir vóru ónøgdir við framførsluna, tí at tey klappaðu hart eftir framførsluna hjá VOX

Eftir hetta sungu VOX sangin ”Eig mítt hjarta”. Hetta er ein frálíkur atmosferiskur sangur við gittarsolo, durhækkan og øllum sum hoyrir til. Frálíku sangararnir megnaðu at geva undirritaða gásarhold til hendan sangin. Besti sangurin hjá VOX hetta kvøldið!

## Keyp eitt hús í Kongo

Ein umboðsmaður frá ADRA rósti VOX sera nógv eftir teirra framførslu.

- Jeg har sunget i kor i 40 år, men det her er det bedste, jeg nogensinde har hørt, segði hann.

Síðani varð kunnað um støðuna í Kongo, og arbeiðið hjá ADRA, meðan myndir vóru vístar frá uppvørpu. Alt yvirskotið frá konsertini fer til hús til afturvend flóttafólk í Kongo. Tað var eisini møguleiki at figgja eitt heilt hús í Kongo fyri 3.200 krónur ella geva eina minni upphædd til arbeiðið hjá ADRA.

Ímeðan innsavningin gekk, spældi Paulo Russo, pianisturin hjá Ettu Cameron, nøkur instrumental løg.

## Etta hevði ein boðskap

Eftir innsavningina kom Etta klappandi inn og sang sangin ”Crown him” við hennaru myrku, djúpu rødd.

Hon legði við næsta sanginum dent á, hví hon var í Fuglafirði hetta kvøldið. Teksturin segði, ”If I can tell somebody about Jesus Christ, my living shall not be in vain”. Etta syngur sera væl, og hon dugir eisini sera væl at greiða áhoyraranum frá, hvat liggur á hennara hjarta.

Hon brúkar kropsmálið sera nógv, og hóast áhoyrararnir kanska ikki orkaðu at klappa allatíðina til sangirnar, so vóru teir ”við uppá tað”.

Føroyingar eru eitt sindur afturhaldnir og reserveraðir, men Etta megnaði tó at fáa áhoyrararnar so nøkunlunda úr sínum góða skinni, tí at hon heitti uttan steðg á áhoyrararnar um at klappa til sangirnar.

VOX kom inn á pallin aftur til sangin ”Christ is all the World to Me”. Tað hoyrdist, at sangararnir í VOX vóru ikki eins tryggir og til teirra egnu framførslu, men tað er ikki so løgið, tá ið hugsað verður um, at tey einans høvdu ein seinnapart til at venja saman við Ettu.

## Sterka útstráling

Til ”When the Saints come



*VOX hitaði upp fyri Ettu Cameron*